# 20 AV TEIMUM STÓRU

## Gjøgnumgongd av útvaldum roknskapartølum hjá 20 av teimum stóru fyritøkunum í Føroyum

**Um greiningina**

Greiningin er gjørd við útgangsstøði í almennu roknskapunum hjá 20 teimum størstu fyritøkunum í Føroyum.

Tá mett hevur verið um støddina á felagnum, er útgangsstøðið tikið í upplýstari nettosølu hjá felagnum.

Fíggjarfeløg, íroknað peningastovnar, tryggingarfeløg o.l. eru ikki tikin við í greiningina. Harumframt verður mett, at Bakkafrost er so mikið stórt í mun til hini feløgini, at hetta felagið skeiklar tølini, og tískil er Bakkafrost ikki tikið við í greiningina.

**Roknskapartøl fyri árini 2016 – 2020**
Greiningin er gjørd útfrá almennu roknskapunum hjá feløgunum fyri árini 2016 – 2020. Greiningin samanber vøkstur og vakstrartøl fyri eitt tíðarskeið uppá 5 ár.

**Viðkomandi lyklatøl**
Greiningin lýsir gongdina hjá feløgunum við hesum lyklatølum:

- Nettosøla
- EBIT – Margin
- EBIT
- Íløgur
- Nettoskuld

**Feløgini í greiningini**
Almennu roknskapirnir hjá fylgjandi feløgum eru nýttir í greiningini.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

**Nettosølan er lækkað nógv í árinum, eins og EBIT marginan lækkar, meðan nettoskuldin hækkar. Harafturímóti eru íløgurnar nógv øktar í árinum.**

# -9,5 %

**Nettosølan minkar**

Nettosølan er nógv minkað hjá teimum størru feløgunum.

Heili 11 av teimum 20 valdu feløgunum hava havt eina minking í nettosøluni.

Meðalvøkstur (vektað pr. felag) er -5,8% (2018: 6,9%) í meðan samlaði vøksturin er -9,5% (2019: 7,5%).

# -3,2%

**Lækking í EBIT**

EBIT marginan lækkar 3,2%, og er hetta ein lutfalsliga stór lækking. Harumframt hevur EBIT marginan verið støðugt lækkandi hesi seinastu 5 árini, við undantaki av 2019.

11 av teimum 20 feløgunum hava eina lækking í EBIT, og gongdin hevur verið negativ hesi seinastu 5 árini.

# 52,5%

**Íløgurnar økjast**

Íløgurnar hjá teimum størru feløgunum eru øktar við 52,5% samanhildið við seinasta ár.

Eftir fleiri, ár har íløgurnar hava ligið støðugt millum 1,1 – 1,3 mia.kr., eru íløgurnar fyri 2020 øktar til 1,9 mia.kr.

# 6,5%

**Øking í nettoskuld**

Nettoskuldin hjá teimum stóru feløgunum er økt við 6,5% í 2020.

Nettoskuldin hevur verið í einum støðugum vøkstri seinastu 5 árini.

Verða feløgini vektað eins, so hækkar nettoskuldin 13,3% í meðal pr. felag.

# Lyklatøl

| | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vøkstur í nettosølu (%) | -9,5% | 7,5% | 2,5% | 4,2% | 6,3% |
| Nettosøla – tal (mia.kr.) | 9,7 | 10,7 | 10,0 | 9,7 | 9,3 |
| Nettosøla – Index (2016 = 100) | 104 | 115 | 107 | 104 | 100 |
| EBIT % | 7,1% | 10,2% | 9,9% | 13,3% | 15,2% |
| Íløgur (mia.kr.) | 1,9 | 1,3 | 1,3 | 1,1 | 1,3 |
| Rentuberandi skuld (mia.kr.) | 4,9 | 4,6 | 4,5 | 4,2 | 3,8 |
| Eginognarpartur (%) | 49,2% | 53,7% | 51,8% | 49,3% | 46,9% |
| Meðal ársverk (tal) | 3.637 | 3.579 | 3.408 | 3.197 | 3.168 |
| Nettosøla pr. ársverk (mió.kr.) | 2,7 | 3,0 | 2,9 | 3,0 | 2,9 |
| Ársúrslit (mia.kr.) | 0,5 | 0,9 | 0,8 | 1,1 | 1,1 |

# -9,5 %

Nettosølan minkar við 9,5% samanhildið við 2019.
Hetta er ein lutfalsliga stór lækking samanhildið við seinastu 5 árini.

## Vøksturin í nettosøluni steðgaði í 2020




Einstakar fyritøkur hava størri ávirkan á nettosøluna samanborið við aðrar. Tríggjar av stóru fyritøkunum standa fyri 25% av samlaðu nettsøluni.

Samlaða nettosølan hevur verið í støðugum vøkstri hesi seinastu árini, men vøksturin steðgaði í 2020.

Samlaða nettosølan lækkaði við 9,5% í mun til undanfarna ár (2019: 7,5%), ið er ein lækking uppá 1,0 mia.kr.

Tann samlaða nettosølan fyri 2020 er 9,7 mia.kr. (2019: 10,7 mia.kr.).



## 11 av teimum 20 feløgunum hava minkandi nettosølu

Í 2020 vóru 11 feløg, ið høvdu eina minkandi nettosølu (2019: 5). Einki felag hevði eina økta nettosølu á meira enn 20% (2019: 1).




Um feløgini verða vektað eins, er talan um eina minking uppá 5,8% (2019: +6,9%), meðan samlaða nettosølan minkar við 9,5% (2019: +7,5%).

(við meðalvøkstri kann hvørt einstakt felag í mesta lagi hava eina ávirkan uppá +/- 100%).



# -3,2%

EBIT marginan lækkar hjá teimum stóru feløgunum

**Rakstraravkastið hjá fyritøkunum er minkandi.**

EBIT-marginan er lækkað til 7,1% í 2020 (2019: 10,3%). Sæð yvir eitt 5 ára tíðarskeið er gongdin niðurgangandi.

Niðanfyri eru tey 3 feløgini, ið høvdu størstu prosentvísu økingina í EBIT í mun til 2019.









## Samlaða rakstraravkastið er nógv minkað í 2020

Rakstraravkastið hevur verið minkandi síðani 2016, tó við undantakið av 2019.




## Rakstraravkastið fyri hvørt felagið er í meðal lækkað 10,1%

Um feløgini verða vektað eins, so er raktstraravkastið minkað við 10,1% samanhildið við ein vøkstur uppá 18,8% í 2019.

Samlaða rakstraravkastið er minkað við 37,4% samanhildið við 2019.



# 52,5 %

Íløgurnar eru øktar samanhildið við undanfarna ár.

## 1,9 mia.kr. í íløgum í 2020

Tær stóru fyritøkurnar hava brúkt slakar 1,9 mia.kr. í íløgum í 2020 (2019: 1,3 mia.kr.).

10 av 20 fyritøkum gjørdu størri íløgur í 2020 samanhildið við undanfarna ár (2019: 7 feløg).









## Netto rentuberandi skuld økt við 6,5%

Samlaða nettoskuldin hjá fyritøkunum er økt við 6,5%. Verða feløgini vektað eins, er talan um ein vøkstur í nettoskuldini uppá -13,3%.

Samanlagt er talan um øking í skuld uppá tils. 300 mió.kr.









## Fyrivarni

Greiningin er bert ætlað sum ein almenn kunning um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga, og skal ikki metast sum ráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá upplýsingum, sum eru í greiningini uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan ella vissu um rættleikan ella fullkomileikan av upplýsingum, ið eru tiknar við í hesi greiningini.